Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 28.01.2021 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen<br>Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 1/21 | 21/00059-2 | Uppskot til broyting í kommunustýrisskipanini - mán 21/00059 | 3 |
| 2/21 | 21/00058-1 | Val av limi í Báta- og listasavnið | 4 |
| 3/21 | 21/00056-1 | Limir í barnaverndarnevndina - mál 00/00056 | 5 |
| 4/21 | 20/00340-3 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 20/00340 - Umsókn um minnisrit um heimamissiónsarbeiði í 100 ár | 6 |
| 5/21 | 21/00006-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00006 - Umsókn um stuðul til Víking 2021 | 7 |
| 6/21 | 21/00012-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00012 - Umsókn um stuðul til G! Festival 2021 | 8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7/21 | 21/00024-2 | Málslýsing og tilmæli mál 21/00024 - Roknskapur bókasøvnini 2020 | 9 |
| 8/21 | 21/00019-2 | 21/00019 - Sundurbýti av matr. nr. 21 og 22 í Syðrugøtu | 10 |
| 9/21 | 20/00351-6 | 20/00351 - Íbúðarbygging í Eysturkommunu, 2020 | 11 |
| 10/21 | 21/00057-1 | Val av valnevnd og valstýri - mál 21/00057 | 12 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 1/21 Uppskot til broyting í kommunustýrisskipanini - mán 21/00059

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 1/21 | 21/00059-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til broyting í kommunustýrisskipanini.<br><br>Broytingarnar eru hesar:<br><br>• Trivnaðarnevndin broytir navn til Umhvørvis og trivnaðarnevndin.<br>• Fríðkan av bygdunum verður málsøki hjá trivnaðarnevndini, hetta hevur verið málsøkið hjá trivnaðarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini<br>• Bussleið veðrur flutt frá vinnunevndini til trivnaðarnevndina.<br>• Umhvøvi og renovatión verður nýtt málsøkið í trivnaðarnevndin umsitir. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 28. januar 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til kommunustýrisskipan

## 2/21 Val av limi í Báta- og listasavnið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 | 21/00058-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna skal velja 3 limir í nevndina fyri Báta og Listasavnið. Politisku umboðini eru vald (2 limir), men umboðið fyri umsitingina er ikki valt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at velja Ova Heinesen í nevndina. |

**Býráðið 28. januar 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 3/21 Limir í barnaverndarnevndina - mál 00/00056

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 3/21 | 21/00056-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna skal velja 2 limir í felags barnaverndarndina hjá Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu. Undanfarnu 4 árini hava Hugo Leo, Leirvík og Elin S. Olsen, Syðrugøta |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at velja Hugo Leo, Leirvík og Elin S. Olsen, Syðrugøta í barnaverndina. |

**Býráðið 28. januar 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 4/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 20/00340 - Umsókn um minnisrit um heimamissiónsarbeiði í 100 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.01.2021 | 4/21 | 20/00340-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.01.2021 | 1/21 | 20/00340-3 |
| 3 Býráðið | 28.01.2021 | 4/21 | 20/00340-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við at tað komandi ár eru liðin 100 ár síðani heimamissiónsarbeiðið, ið byggir á fólkakirkjunnar grund, tók seg upp í Leirvík, hevur stýrið fyri Leirvíkar missiónshús sett sær fyri at geva eitt minnisrit út, ið lýsir arbeiðið hesi 100 árini, frá 1921 til 2021. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kostnaðurin av sjálvari prentingini er uml. Kr. 35.000,-. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Um kommunan stuðlar útgávuni, verður stuðulin tikin av konto 522 “Stuðul til mentan” ella eykajáttan verður gjørt. |

**Mentanarnevndin 19. januar 2021**

Mæla til at stuðla útgávuni við kr. 35.000 fyri prentútreiðslur, soleiðis at minnisritið kann koma út í hvørt hús í Leirvík. Peningur verður tikin av konto 522 “Stuðul til mentan”.

**Fíggjarnevnd 25. januar 2021**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 28. januar 2021**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Petur Súni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

## 5/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00006 - Umsókn um stuðul til Víking 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.01.2021 | 3/21 | 21/00006-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.01.2021 | 2/21 | 21/00006-2 |
| 3 Býráðið | 28.01.2021 | 5/21 | 21/00006-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ítróttarfelagið Víkingur søkir Eysturkommunu um stuðul í 2021 áljóðandi kr. 600.000.<br><br>Fyri árið 2020 søkti Víkingur um kr. 400.000 og var hesin stuðul játtaður teimum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kr. 550.000 eru setta av á fíggjarætlanini 2021 til "Stuðul til ítrótt" – konta 524.<br><br>Undanfarin ár er hendan játtan brúkt sum rakstrarstuðul til Víking, Reysta og Tind. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at veita stuðul, men um so er at stuðulin skal verða hægri enn undanfarna ár, er neyðugt við eykajáttan, tí vænast kann, at annar ítróttur í kommununi, eisini vil søkja um rakstrarstuðul. |

### Mentanarnevndin 19. januar 2021
Mælt verður til at játta stuðul á 600.000 kr. Kr. 400.000 verða tiknar av konto 524 "Stuðul til ítrótt". Írestandi kr. 200.000 verða játtaðar í samband við endurskoðan av Fíggjarætlanini 2021 fyri Eysturkommunu.

### Fíggjarnevnd 25. januar 2021
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

### Býráðið 28. januar 2021
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 6/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00012 - Umsókn um stuðul til G! Festival 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.01.2021 | 2/21 | 21/00012-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.01.2021 | 3/21 | 21/00012-2 |
| 3 Býráðið | 28.01.2021 | 6/21 | 21/00012-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsókn frá G! Festivalinum um stuðul til G! Festivalin 2021 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kr. 200.000  eru settar av til endamálið í 2021 |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at veita stuðul á 200.000 kr. |

### Mentanarnevndin 19. januar 2021

Mælt verður til at veita stuðul á 200.000 kr. Stuðulin verður tikin av konto 518 "Ymisk mentanartiltøk".

### Fíggjarnevnd 25. januar 2021

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

### Býráðið 28. januar 2021

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

# 7/21 Málslýsing og tilmæli mál 21/00024 - Roknskapur bókasøvnini 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.01.2021 | 4/21 | 21/00024-2 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 7/21 | 21/00024-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Fyri at fáa endurgjald fyri bókasøvnini skal roksnakapur sum er góðkendur av býráðnum fyriliggja. Seinasta freist at søkja um endurgjald er 31/1. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at gókenna fyriliggjandi roknskap. |

**Fíggjarnevnd 25. januar 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**Býráðið 28. januar 2021**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

## 8/21 21/00019 - Sundurbýti av matr. nr. 21 og 22 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.01.2021 | 2/21 | 21/00019-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.01.2021 | 6/21 | 21/00019-2 |
| 3 Býráðið | 28.01.2021 | 8/21 | 21/00019-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 22 í Syðrugøtu keypti í 2009 gomlu sethúsini ið eru samanbygd við Valhøll. Í hesum sambandi hevur ymiskt verið at fingið uppá pláss.<br>Kommunan hevur gjøgnum árini havt fleiri fundir við ánara, har man hevur tosa um tingini. Millum annað skulu húsini skiljast sundur.<br><br>Víst verður til skjal "*Notat – Tilmæli til loysn matr. nr. 21-22 í Syðrugøtu*".  Í málinum.<br><br>Grundin til at kommunan skal fáa hesi viðurskiftir uppá pláss er, at skúrur og trappa hjá kommununi stendur inni á matrikklinum hjá ánara av matrikul. nr. 22. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Mett verður at hetta kemur at kosta áleið 300.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at játta peningin og gera tey átøk, ið eru lýst í skjalinum "*Notat – Tilmæli til loysn matr. nr. 21-22 í Syðrugøtu*". |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 21. januar 2021**
Málið verður tikið av skrá.
Umsitingin kannar onkur viðurskiftir til komandi fund, tá verður málið til aftur til viðgerðar.

**Fíggjarnevnd 25. januar 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 28. januar 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 9/21 20/00351 - Íbúðarbygging í Eysturkommunu, 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.01.2021 | 1/21 | 20/00351-6 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.01.2021 | 5/21 | 20/00351-6 |
| 3 Býráðið | 28.01.2021 | 9/21 | 20/00351-6 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Nakrar fyritøkur hava víst áhuga fyri at byggja íbúðir í Eysturkommunu. Býráðið setti ein bólk á stovn fyri at tosa við fyritøkurnar og viðgera teirra tilfar.<br><br>Bólkurin hevði ein fund við fyritøkurnar. Men vegna stóra útskifting í býráðnum eftir seinasta val, hendi ikki meir í málinum.<br>Nú verður málið tikið aftur til viðgerðar. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 21. januar 2021**

Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at marknaumskipa matr. nr. 72f í Norðragøtu, sum víst á kort "*Økið til íbúðarbygging í NG*" í málinum og bjóða tað út til íbúðarbygging.
Mælt verður eisini til at arbeiða víðari við at finna økir til íbúðarbygging í Leirvík og Syðrugøtu.

**Fíggjarnevnd 25. januar 2021**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. januar 2021**

Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 10/21 Val av valnevnd og valstýri - mál 21/00057

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 10/21 | 21/00057-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Hesi fólk eru spurd, og hav játtað av verða í valnevndunum/valstýrunum<br><br>**Kommunuvalnevndin:**<br>Poula G. á Líðarenda, formaður<br>Eilin Andreasen<br>Ove Heinesen<br><br>**Valnevndin í Gøtu:**<br>Poula G. á Líðarenda, formaður<br>Poula Poulsen<br>Dagmar Jacobsen<br><br>**Valnevndin í Leirvík:**<br>Eilin Andreasen, formaður<br>Frida Tróndheim<br>Signar á Reynatrøð |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 28. januar 2021**
Einmælt samtykt at velja omanfyri standandi valnevndir og valstýri.

fundurin lokin 18.30

Per Martin Gregersen

Hanna Jensen

Hjalti Dalheim

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen